Munnligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Kárason Petersen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Kampusætlan

Spurningar:

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin í mun til ætlanina um eitt savnað kampusøki í samsvari við kampusætlanina frá 2018?
2. Er landsstýrismaðurin í ferð við at seta í verk kampusætlanina frá 2018?
3. Nær kunnu vit vænta eitt liðugt kampusøki?

Viðmerkingar:
Í desember 2018 varð ein strategisk kampusætlan gjørd, og varð handað Mentamálaráðnum í februar 2019.

Kampusætlanin tekur hædd fyri bæði verandi og framtíðar tørvi hjá útbúgvingar- og granskingarøkinum í Føroyum, og fyri at røkka málinum um at menna eitt altjóða kappingarført Fróðskaparsetur, er neyðugt at savna alt virksemi í eitt øki.

Strategiska kampusætlanin er ein liður í tilgongdini at fáa eitt tíðarhóskandi undirvísingar- og granskingarumhvørvi. Kampusøkið skal eftir ætlan vera ein savnandi miðdepil fyri lesandi, undirvísarar og granskarar í Føroyum.

Á Løgtingi, 22. mars 2022

Bjarni Kárason Petersen